# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*
Fútalág 1B ϑ P.O.Box 1134 ϑ FO-110 Tórshavn ϑ Faroe Islands
Tlf. +298 317811 ϑ Fax +298 314489 ϑ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo



***Skrásetingar nr.:***

**R-E014-1**


# Reglugerð
# um
# arbeiði við telduskipanum

Við heimild í § 17, stk. 2 í løgtingslóg nr. 58 frá 24. mai 1974 um arbeiðaravernd við seinni broytingum, hevur Arbeiðseftirlitið fyrisett hesar reglur, ið fáa gildi frá niðanfyri standandi dagfesting:

## KAPITTUL 1

***Øki og lýsingar***.

**§ 1.** Reglugerðin fevnir um arbeiði hjá starvsfólkum, ið fyri ein stóran part av arbeiðstíðini nýta telduskipan.

**Stk. 2.** Í hesi reglugerð skal skiljast:

***Telduskipan:*** alfanumeriskur ella grafiskur skíggi, uttan mun til hvat slag av sýnistøkni, ið verður nýtt.

***Arbeiðsstøð fyri telduskipan:*** skipan, ið umfatar alt teldukervið, møgulig útgerð við knappaborði ella annað innlesingar/stýrikervi (mús v.m.), og/ella tann forritspartur, ið ásetir samspælið millum menniskja/maskinu og restina av tilhoyrinum, herundir disklastøð, telefon, mótald, prentara, arbeiðsstól og arbeiðsborð ella yvirflatan av innbúgvi í nánd.

## KAPITTUL 2.

***Almennar reglur***.

**§ 2.** Arbeiðsstøð til telduskipan skulu innrættast og útgerðast við innbúgvi, soleiðis at arbeiðið kann útinnast trygt og heilsuliga fult forsvarligt, smb. reglunum um innrættan av arbeiðsplássum.


***Lógarheimild:***
Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24 mai 1994 við seinni broytingum.

***Útgivið fyrstu ferð:***
**1. februar 1994**

***Seinastu broytingar:***
**4. november 1999**


## KAPITTUL 3.

*Serligar reglur*.

**§ 3.** Í arbeiði hjá starvsfólkum, ið fyri ein stóran part nýta telduútgerð, eru harumframt reglurnar í §§ 4-6 galdandi.

**Stk. 2.** Undantikið er tó:

1) EDV-kerv í samband við førarapláss á akførum og maskinum.
2) EDV-kerv, ið er sett í ella á flutningstól og sum er ætlað til at stýra/ansa eftir flutningstólinum.
3) EDV-kerv, sum í fyrsta lagi er ætlað øðrum enn sjálvum starvsfólkunum.
4) Farteldur (PC'arar), ið ikki regluliga verða nýttar á einum arbeiðsstaði.
5) Roknimaskinur, kassatól og øll útgerð við smáum sýnum (display) til at vísa dáta ella mátivirðir, sum eru neyðug til beinleiðis nýtslu av hesi útgerð.
6) Vanligar skrivimaskinur við sýni (display).

**§ 4.** Arbeiðið við telduskipan skal leggjast soleiðis tilrættis, at dagliga arbeiði við telduskipanini regluliga verður skift við annað arbeiði. Har hetta ikki ber til, eiga reglulígir steðgir at verða hildnir, so sleppast kann undan heilsuskaðiligum árini.

**§ 5.** Arbeiðsstað til telduskipan skal innrættast í samsvar við krøvini í fylgiskjalinum.

§ 6. Starvsfólkini hava rætt til at fáa eygu og sjón kannaði:

1) Áðrenn byrjað verður at arbeiða við telduskipanini.
2) Við jøvnum millumbili í hesum arbeiði.
3) Um trupulleikar taka seg upp við sjónini, ið kunna stava frá arbeiðnum við telduskipanini.

Stk. 2. Kanningin skal gerast av persóni við neyðugari vitan og førleika.

Stk. 3. Starvsfólkini hava rætt til eygnakanning hjá serlækna, um tær í stk. 1 og 2 nevndu kanningar vísa, at hetta er neyðugt.

Stk. 4. Starvsfólkini skulu hava útflýggjað serlig sjóntilrætta hjálpitól, herundir brillur ella eygnakúpur, ið eru ætlað til tað ávísa arbeiðið, um tær í stk. 1-2 ella 3 nevndu kanningar vísa, at hetta er neyðugt, og um egnar brillur ella eygnakúpur ikki kunna nýtast.

Stk. 5. Arbeiðsgevarin skal tryggja, at starvsfólkini kunna koma til tær i stk. 1-3 nevndu kanningar uttan útreiðslur og so vítt gjørligt í vanligari arbeiðstíð, og hevur eisini skyldu til at syrgja fyri, at starvsfólkini fáa útflýggja tær í stk. 4 nevndu brillur ella eygnakúpur uttan kostnað fyri starvsfólkini.

## KAPITTUL 4.
### *Kærur.*

**§ 7.** Tær treytir, sum Arbeiðseftirlitið setir og aðrar avgerðir, sum tað tekur, kunna skjótast inn til Landsstýrið inna 4. vikur eftir at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina.

**Stk. 2.** Rættstundis kæra er tálmandi, tó ikki kæra um treytir, sum givnar eru eftir § 32 í arbeiðaraverndarlógini.

## KAPITTUL 5.

***Revsing*.**

**§ 8.** Brot á hesa reglugerð verða revsað eftir § 40 í løgtingslóg nr. 58 frá 24. mai 1974 um arbeiðaravernd við seinni broytingum.

**Arbeiðseftirlitið**, 1. desember 1993

Eli Davidsen, stjóri (sign.)

## FYLGISKJAL

### *1. Útgerð.*

a) *Almennar viðmerkingar.* Nýtsla av útgerðini má ikki í sær sjálvum verða til nakran vanda fyri trygd og heilsu hjá starvsfólkunum.

b) *Skíggin.* Teknini á skíggjanum skulu verða væl avmarkaði og klár í skapi. Tey skulu verða nóg stór, og tað skal verða nóg mikið av plássi millum teknini og reglurnar.

Bílætið skal verða støðufast og má ikki titra ella verða óstøðugt á annan hátt.

Mótsetningurin millum teknini og baksýni skal lætt kunna stillast av tí persóni, sum nýtir telduútgerðina, soleiðis at hetta samsvarar við øki rundanum.

Telduútgerðin skal uttan trupulleika kunna snarast og hellast, soleiðis at hon hóskar til brúkarin. Hetta kann eisini gerast við serligum fóti til skíggjan, ella við borði, ið kann stillast í hædd v.m.

Telduútgerðin skal kunna støðast soleiðis, at sleppast kann undan ørkymlandi endurskini og speglingum á skíggjanum.

c) *Innlesingar/stýrikervi.* Innlesingar/stýrikervi (knappaborð, mús v.m.) skal verða soleiðis tilgjørt, at arbeiðsstøðurnar/-rørslurnar verða hóskandi.

Knappaborðið skal kunna skrástillast og verða leyst frá skíggjanum, soleiðis at brúkarin kann hava góða arbeiðsstøðu/-rørslu fyri at sleppast kann undan møði í ørmum og hondum.

Tað skal verða nóg mikið av plássi kring knappaborðið og annað innlesingar/stýrikerv, so at brúkarin kann hvíla hendur og armar á borðflatuni.

Knappaborðið skal hava eina óblanka yvirflatu so einki endurskin verður.

Knappaborðið og knapparnir skulu hava eitt tílíkt snið, at tað er lætt at nýta.

Teknini á knappunum skulu verða klár og týðilig at lesa frá nýttu arbeiðsstøðuni.

d) *Arbeiðsborð ella -flata.* Arbeiðsborðið ella arbeiðsflatan skal hava eina óblanka yvirflatu. Arbeiðsborðið/-flatan skal verða nóg stór og møguleiki eigur at verða fyri at gera ymiskar broytingar í uppsetanini av skíggja, knappaborði, skjølum og øðrum tilhoyri.

Skjalhaldarin skal verða støðugur og kunna stillast í allar týðandi støður. Hann skal í arbeiðinum verða støðaður soleiðis, at ørkymlandi høvuðs- og eygnarørslur verða minst møguligar.

Tað skal verða nóg mikið av plássi, so starvsfólkið kann nýta bestu arbeiðsstøðu/-rørslu.

e) *Arbeiðsstólur.* Arbeiðsstólurin skal verða støðugur og tryggja brúkaranum rørslufrælsi og hóskandi arbeiðsstøðu. Stólasetrið skal kunna hæddarstillast. Stólaryggurin skal kunna stillast í hædd og skrástillast. Egnaður fótskammil skal verða tøkur til tey sum ynskja tað.

**2. Arbeiðsplássið**.

a) *Plásskrav.* Arbeiðspláss til telduskipanir skulu hava nóg mikið av rásarúmi og verða soleiðis innrættaði, at møguleiki er fyri skiftandi arbeiðsstøðum og arbeiðsrørslum.

b) *Ljósviðurskifti.* Rúmljósið og serljósið (arbeiðslampur) skulu tryggja nóg mikið av ljósi í einum hóskandi mótsetningi millum skíggja og øki rundanum, í mun til slag av arbeiði og sjónartørvin hjá brúkaranum.

   Innrættingin av hølunum og telduarbeiðsplássinum eigur at verða soleiðis skipað, at tað slepst undan ørkymlandi glámlýsi og endurskini á skíggjan, somuleiðis sum teir tøkniligu eginleikarnir í nútímans ljósútgerð eiga at verða nýttir.

c) *Endurskin og glámlýsi.* Arbeiðspláss til telduskipanir skulu innrættast soleiðis, at ljóskeldur, so sum vindeygu og onnur op, gjøgnumskygdir veggir og ljóslitað útgerð ella ljóslitaðir veggir, ikki geva endurskin ella glámlýsi á skíggjan.

   Vindeyguni skulu verða útgjørd við hóskandi skjóli, ið kann stillast at forða dagsljósi at fella inn á telduarbeiðsplássi.

d) *Óljóð.* Tá arbeiðspláss til telduskipan verður innrættað, skal ansast eftir óljóði frá tilhoyrandi útgerð, soleiðis at hetta ikki nervar arbeiðsumhvørvið.

e) *Hiti.* Útgerð, ið hoyrir til telduskipanina, má ikki geva so nógvan hita frá sær, at hetta er til ampa fyri starvsfólkini.

f) *Geisling, íroknað lágfrekvent elektromagnetisk felt.* Geislingar, ið ikki stava frá tí sjónliga partinum av elektromagnetiska litbandinum, skulu minkast mest møguligt fyri at verja trygdina og heilsuna hjá starvsfólkunum.

g) *Luftvæta.* Ein hóskandi luftvæta skal fáast tilvega og haldast á arbeiðsstaðnum.

**3. Samanspæl millum telduútgerð og menniskja.**

Arbeiðsgevarin skal í sínum uppskoti, vali, keypi og broytingum í skráum og við skipan av arbeiðsuppgávum, sum hava við sær nýtslu av eini telduskipan, hava atlit til fylgjandi punktir:

a) Skipanin skal verða tillagað tí arbeiðið, sum skal gerast.
b) Skipanin skal verða løtt at nýta og um neyðugt kunna tillagast brúkarans førleika og royndir. Nøgdar- og góðskueftirlit má ikki nýtast, uttan at starvsfólkini vita tað.
c) Skipanin skal upplýsa starvsfólkini um gongdina í arbeiðinum.
d) Skipanin skal geva upplýsingar, sum í vavi og títtleika eru tillagaði brúkaranum.
e) Ergonomiskar meginreglur skulu nýtast, serliga við atliti til brúkarans arbeiði við dáta.

Eli Davidsen, stjóri